








## Ólavsøku-blaðið 2004

**Útgevari:**
Sosialurin
post@sosialurin.fo

**Blaðstjóri:**
Jan Müller
jan@sosialurin.fo

**Blaðstjórn:**
Ingrid Bjarnastein
ingrid@sosialurin.fo

**Høvundar:**
Eyðun Klakstein
eyðun@sosialurin.fo

Solby A. Eliasen
solby@sosialurin.fo

Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Anna Ellingsgaard
anna@sosialurin.fo

Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

**Myndir:**
Jens Kristian Vang
jensk@sosialurin.fo

Álvur Haraldsen
alvur@sosialurin.fo

**Lýsingar:**
Gudny Langaard
gudny@sosialurin.fo

**Umbróting:**
Føroya Prent

**Prent:**
Prentmiðstøðin


*Endurgeving úr hesum blaði er bert loyvd, um greitt verður víst til kelduna*

# Vit mynda øll ólavsøkuna

*Heilsanir frá borgarstjóranum í Havn*

Tað er ein heiður hjá Tórshavnar Kommunu av verða vertur fyri okkara Tjóðarhátíð, og kommunan setur stóra æru í, at býurin er reinur og vakur, nú fólk í túsundatali koma til høvuðsstaðin at halda ólavsøku.



Sjálv ólavsøkan verður sett av Oddvá Nattestad mikudagin, ólavsøkuaftan, undir Tinghúsinum, hagar Havnar Hornorkestur kemur marsjerandi og blásandi í gjøgnum býin, eins og teir hava gjørt í skjótt 100 ár, við stórum hópi av ítróttarfólki og reiðumonnum í hølunum. Rættuligur hátíðardámur er á Vaglimum, har fólkamongd er komin saman at hoyra, hvat røðarin hevur at frambera. Eftir at Oddvá hevur sett ólavsøkuna verður tjóðarsangurin spældur, og so byrja øll tiltøkini, ið eru í býnum.

Skráin fyri tjóðarhátíðina er fjølbroytt. Gamaní er broytingin ikki tann stóra ár frá ári, men nógv er at fara til. Vit kunnu fara á alskins framsýningar, ítróttarkappingar, kristiligar fundir, midnáttarsang og føroyskan- eins og útlendskan dans.

Hósdagin, ólavsøkudag verður Løgtingið sett, og altíð er ein hátíðardámur yvir løtuna, tá skrúgongan, umboðandi tað politiska og tað kirkjuliga, gongur frá Dómkirkjuni niðan í Tinghúsið, har gongan verður heilsað av fólkafjøld og stórum kóri, ið framber yndisligan sang og nýggja ólavsøkukantatu.

Tað var ikki av tilvild, at teir gomlu løgdu Tingstaðin her í Tórshavn. William Heinesen kallar Havnina fyri heimsins nalva, og vit, sum búgva her, geva honum rætt. Havnin er er miðjan í Føroyum, og er tað óivað av praktiskum grundum, at vit føroyingar bert hátíðarhalda okkara tjóðardag í høvuðsstaðnum.

Ólavsøkan er er okkara tjóðarhátíð, og hana eiga vit øll. Hjaltaliga vælkomin til býin, bæði ung og gomul, sambandsfólk eins og tit loysinghugaðu. Vit mynda øll ólavsøkuna, og tí er umráðandi, at vit gera okkara til, at hýrurin er góður. Veðrinum eru vit ikki harrar yvir, men hásummar er, og kunnu vit vóna at veðrið verður turt og gott.

Tórshavnar Ítróttarráð hevur ein virknan leiklut í stevnuhaldinum, og er tað kanska ikki so løgið, tí ítrótturin myndar stóran part av ólavsøkuni. Sum borgarstjóri er at fegnast um, at ítróttarfeløgini í kommununi klára seg so væl í kappingum bæði í báti og á leikvøllum. Og spennandi verður, hvør fer við Løgmanssteypinum í ár. Veður tað NSÌ ella verður tað 100 ára gamla havnarliðið HB, ið fer við sigrinum. Ikki minni spenningur er við kappróðrinum, har Nólsingurin og Havnarbáturin berjast um meistaraheitið í tíggumannaróðrinum. Kann tað hugsast, at Dávid vinnur á Goliat?

At enda fari eg at takka øllum tykkum, ið leggja eitt stórt arbeiði í at ólavsøkan kann vera so fjølbroytt, sum skráin vísir.

Tað er mín vón, at tit fara at njóta ólavsøkuna, og at tit fara heim aftur við nógvum góðum minnum.

Góða ólavsøku

**Jan Christiansen,**
**borgarstjóri**

# Ólavsøkan fyri allar føroyingar

Allar tjóðir hava ávísar dagar og ávísar hendingar, sum eru við til at savna og menna tjóðina. Hjá okkum føroyingum er tað ólavsøkan, ið er hátíðin fram um allar aðrar hátíðir. Uttan mun til, hvørja politiska ella átrúnaðarliga áskoðan vit enn hava, so eiga allir føroyingar ein sterkan tjóðskaparligan samleika. Vit kenna okkum sum føroyingar. Vit eru felags um mál, søgu og mentan. Tað verður so av og á sagt, at tjóðskaparligur samleiki kann gerast ein forðing fyri, at vit føroyingar kunnu taka virknan lut í altjóða samfelagnum. Men veruleikin er heldur tann, at tjóðskaparliga tilvitið er gott fyri eina tjóð, ið sum tann føroyska er ósamd um t.d. átrúna og politikk.



Ólavsøkan er fram um alt annað tann einstaka hending, sum savnar føroyingar. Hon er ein partur av okkara samleika. Tí eru øll góð við ólavsøkuna. Henda hátíð fevnir um søgu, mentan, ítrótt og listarligt virksemi úti sum inni. Hóast ólavsøkan tykist at vaksa ár um ár, so tykist ikki sum fólkið troyttast av henni. Tað má tó ásannast, at hátíðin kanska er við at gerast í so kommersiel, og her eiga vit at ansa eitt sindur eftir. Hinvegin so hava søgufrøðingar ført fram, at ólavsøkan er sprottin úr einari keypstevnu einaferð í víkingaøldini. Um hetta mundið var vanligt at halda ting og keypstevnu um somu tíð. Eisini kappleikir og annað til teitis fór fram á hesi stevnu. Við hesum í huga er einki løgið í, at ólavsøkan er vorðin ein blanding av hátíð, mentan, list, ítrótti og sølu. Hinvegin eiga vit sjálvsagt at ansa eftir, at vit ikki fara ov langt burtur frá tí ektaða og upprunaliga, sum eyðkendi ólavsøkuna.

Á ólavsøku verður Føroya løgting sett eftir gudstænastu og skrúðgongu. Føroya løgting er elsta lóggávuting í Europa og eitt hitt elsta parlament í heiminum. Ting, skrúðgonga og gudstænasta gevur ein serstakan hátíðardám og er meira enn nakað annað við til at markera, at her er tað ein kristin tjóð við ríkum siðvenjum og eini langari og hendingaríkari søgu, sum heldur sín tjóðardag. Henda dag leggja vit alt annað til viks. Men ólavsøkan verður sum kunnugt jú hildin í høvuðstaðnum Tórshavn. Samstundis, sum ólavsøkuhaldið fer fram, gongur lívið sum vant úti um alt Føroyaland. Tað er fyri at markera hetta, at vit nýta høvið at senda Sosialin í hvørt hús í Føroyum. Vit vilja markera, at ólavsøkan, hóast hon er í Havn, er hátíðin hjá øllum føroyingum, uttan mun til hvar teir eru staddir. Vit nýta eisini høvið til at vísa okkara blað, sum vit fegin vilja skal vera fyri allar føroyingar. Vit leggja dent á at reka kunningarvirksemi og í hesum virksemi at vera redaktionelt óheft við kritiskum tíðindaflutningi, sum líkur hægstu etisku journalistisku krøv. Vit ynskja at fremja og stuðla menningina av samfelagnum á ein hátt, ið styrkir rættarsamfelag, fólkaræði, samhaldsfesti og virðingina millum menniskju. Við hesum støði vóna vit framhaldandi at kunna gera eitt gott og lesivert blað, ið eins og ólavsøkan, er fyri allar føroyingar.

Góða ólavsøku og gott summar allir føroyingar!

**Jan Müller,**
**blaðstjóri**